Íslandssáttmálin:

# Hóttir føroyskt umhvørvi og arbeiðspláss

**– Vit verða ein av føroysku fyritøkunum, sum koma at merkja sviðan av uttanríkispolitikkinum hjá løgmanni, Jóannesi Ejdesgaard, sigur Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór í Klaksvík**

AVLEIÐINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í hesum døgum sita føroysk embætisfólk og kýta seg fyri at fáa Íslandssáttmálan fyri tingið.

– Lógaruppskotið kemur at hava álvarsligar avleiðingar fyri føroyskt vinnulív. Føroya Bjór, sum í út við 118 ár hevur virkað á føroyska marknaðinum, er ein av fyritøkunum, sum kemur at merkja sviðan av hjartamálinum hjá løgmanni.

Hetta sigur Einar Waag, stjóri í Føroya Bjór.

Hann vísir á, at íslenska vinnulívið hevur yvirfyri uttanlandsdeildini hjá løgmanni trumfað ígjøgnum, at øl- og sodavatnsdósir skulu inn á føroyska marknaðin, hóast umhvørvisvinarligir landspolitikarar seinastu nøgvu árini hava verið hart í móti, at dósir og onnur eingangs embalasja skal koma á okkara marknað.

Føroysku bryggjaríini hava í síni framleiðslu innrættað seg eftir hesum politiska veruleika og tískil ikki gjørt íløgur í dósakolonnur, sum tað verður rópt.

– Íløgurnar í útgerð til dósaáfylling eru í mun til føroyska marknaðin so stórar, at tær als ikki loysa seg, sigur Einar Waag.

Tað, sum Einar rópar "politiska hjartabarnið hjá løgmanni", heldur hann kemur at viðføra, at føroysku bryggjaríini mugu síggja í eyguni, at móti sumri verður framleiðslan hálverað.




*Stjórin í Føroya Bjór, Einar Waag, heldur, at føroysku myndugleikarnir boyggja seg fyri multinationalum fyritøkum í Íslandi*

### Multinationalir stýra

– Íslandssáttmálin leggur upp til, at føroyskar vørur hava frítt at fara á íslendska marknaðinum. So, her skuldu verið møguleikar fyri størri útflutningi. Føroya Bjór hevur gjørt royndir at koma á íslenska marknaðin. Hetta vísir seg tíverri at vera ógvuliga torført, tí tað eru stór multinational bryggjaríír, sum st‡ra hesum marknaði, sigur hann.

Stjórin í Føroya Bjór vísir á, at tað, sum kanska er verri fyri Føroyar í longdini, er tey negativu árini, sum blikk og eingangsíløt koma at hava fyri umhvørvið.

– Higartil hava føroyskir politikarar sæð t‡dningin av at verja umhvørvið á landi og sjógvi móti eingangsíløtum. Tað eru eisini onnur lond, sum við lív og sál verja um sítt umhvørvi, og eitt av hesum londum er Grønland, sigur hann.

Grundsjónarmiðið í handilsavtaluni millum Føroyar og Ísland er, at vørur skulu hava frítt at fara millum londini, tó so, at atlit skulu takast fyri serligum viðurskiftum.

– Hóast vørur og ráværur skulu hava frítt at fara, er tað ein sannroynd, at tað ber ikki til hjá íslenskum skipum at leggja ráváru upp her á landi.

### Óbúnir politikarar

Einar Waag heldur tí nógv benda á, at tað er sera "agressiva" íslenska vinnu- og handilslívið, sum í hesum førinum leggur føroyskar politikarar undir trýst - og at hesir eru við til at ofra føroyskt vinnulív.

– Við hesum í huga, er tað ein góður spurningur, um okkara landspolitikkarar eru búnir at føra uttanríkispolitikk, heldur Einar Waag, stjóri í Føroya Bjór.

---

Innlendismálaráðið:

## Ætlar sær at broyta "embalasjulógina"

**Hugsandi er, at íslendskir útflytarar ætla sær at koma til Føroya við drykkjuvørum í eingangsíløtum, og tá eigur "embalasjulógin" ikki at "diskriminera" íslendsku vørurnar – um tað er diskriminering ikki at loyva eingangsíløtum**

DRYKKJUVØRUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein av lógunum, sum innlendismálaráðið í løtuni arbeiðir við at broyta, er lógin um "íløt til øl, mineralvatn og lidnar leskidrykkir".

Hetta er sonevnda "embalasjulógin", sum eitt nú ásetir, at ikki er loyvt at flyta inn ella selja drykkjuvørur í eingangsíløtum, t.v.s. íløtum, sum bert einaferð verða nýtt til upprunaliga endamálið, sum lógin sigur.

Í lógini stendur eisini, at Toll-og Skattstova Føroya kann geva fyritøkum loyvi til at flyta inn ella selja drykkjuvørur í eingangsíløtum til skip og flogfør, sum "kunnu proviantera toll-og avgjaldsfrítt sambært kunngerð um proviantering av skipum og flogførum til nýtslu umborð ella til sølu til ferðafólk".

Í einum øðrum broti í "embalasjulógini" stendur, at "Toll-og Skattstova Føroya kann krevja, at framleiðarar/innflytarar av nevndu drykkjuvørum skulu prógva, at innsavningar-og returskipan er til staðar sum tryggjar, at íløtini verða send aftur til endurfylling".

### Íslandssáttmálin

Orsøkin til, at innlendismálaráðið arbeiðir við at broyta "embalasjulógina", er Hoyvíkssáttmálin millum Føroyar og Ísland.

Innlendismálaráðið heldur nevniliga, at ásetingin í lógini um forboð ímóti innflutningi av eingangsíløtum ikki er í tráð við tað, sum "man vil við sáttmálanum við Ísland", tí lógin forðar fyri "vørufrælsi", sum er ein partur av sáttmálanum.

Tí metir ráðið, at lógin eigur at verða broytt.

Hugsast kann nevniliga, at íslendskir útflytarar hugsa sær at koma higar til lands við drykkjuvørum í eingangsíløtum, og tá eigur "embalagulógin" ikki at "diskriminera" íslendsku vørurnar – um tað er diskriminering ikki at loyva hesum.

---

Íslandssáttmálin:

## Gerast til lóg yvir øðrum lógum

**Orsøkin til, at løgmaður og landsstýrið vilja gera sáttmálan millum Føroyar og Ísland til lóg, er, at vit hava ein hóp av lógum í Føroyum, sum skulu broytast, um íslendingar skulu fáa tey rættindi í Føroyum, sum sáttmálin leggur upp til. Hetta er ein "teknisk" loysn, sum politiskt stríð er – og ivaleyst fer - at vera um**

SÁTTMÁLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hoyvíkssáttmálin, sum er sáttmálin millum Føroyar og Ísland við teimum f‡ra grundleggjandi frælsunum fyri vørur, tænastur, kapital og fólk, er til politiska viðgerð í uttanlandsnevndini.

Ætlanin hjá løgmanni og landsstýrinum er, at allar tær skyldur, sum Føroyar við sáttmálanum koma at hava mótvegis Íslandi, verða avgreiddar á tann hátt, at sjálvur sáttmálin verður gjørdur til lóg.

Hetta er ein "teknikkur", sum politiskt hevur verið funnist at, tí sáttmálin við hesum verður hevjaður yvir allar aðrar galdandi lógir, sum kunnu hava t‡dning í viðurskiftunum millum Føroyar og Ísland.

Tá ið sáttmálin er samtyktur á tingi, kann ein íslendingur, sum kemur til Føroya, við sáttmálanum í hondini vísa á, hvørji rættindi hann hevur í Føroyum.

### Her standi eg!

Vit kunnu taka eitt tilvildarligt dømi:

Sum er, kann ein íslendingur ikki reka ein biograf í Føroyum, tí her krevst, at hann er danskur ríkisborgari við bústaði í Føroyum.

Tá ið Hoyvíkssáttmálin er vorðin lóg, kann íslendingurin standa við sáttmálanum í hondini í Føroyum og siga, at hann hevur hesi rættindi – líka mikið, hvat ein onnur lóg sigur.

Og soleiðis verður tað allan vegin ígjøgnum – og ikki minst, tá ið talan er um sonevndar tekniskar handilsligar forðingar.

Orsøkin til, at løgmaður og landsstýrið vilja gera sáttmálan millum Føroyar og Ísland til lóg, er, at vit hava ein hóp av lógum í Føroyum, sum skulu broytast, um íslendingar skulu fáa tey rættindi í Føroyum, sum sáttmálin leggur upp til.

Hetta er lættari sagt enn gjørt – í eini handavending, og ikki er vist, at onkur lóg tá ikki liggur eftir, sum ikki er broytt samsvarandi sáttmálanum.

### Eingin "feilur"...

Á henda hátt, heldur løgmaður, at vit best kunnu avgreiða tær skyldur, sum Føroyar koma at hava mótvegis Íslandi – og við at gera sáttmálan til lóg, koma vit heldur ikki at gera nakrar "feilir", sum fólk, ið standa málinum nær, taka til.

Sambært stýriskipanarlógini, grein 55, verður sáttmálin, tá ið hann er samtyktur á løgtingi, soleiðis ein binding yvirfyri Íslandi.

Løgmaður heldur soleiðis, at vit í fyrsta lagi eiga at binda okkum yvirfyri Íslandi, í øðrum lagi binda vit okkum inneftir, og í triðja lagi mugu vit fremja neyðugu lógarbroytingarnar í einstøku lógunum, sum stríða ímóti sjálvum sáttmálanum millum Føroyar og Ísland.